gult cyan magenta svart





*Hoyvíksgarður er nú opin sum útisavn, har til ber at síggja, hvussu ein føroyskur bóndagarður sá út í tjúgunum*
**Myndir: Jens Kristian Vang**

# Hoyvíksgarður aftur í 20‘ini

*Í maimánaði í ár lat upp forvitnisligt útisavn á gamla bóndagarðinum í Hoyvík. Garðurin er restaureraður úr enda í annan, og er nú opin sum savn, ið myndar ein føroyskar bóndagarð í 20‘árunum. Á samkomu tann dagin, savnið lat upp, segði Símun V. Arge, settur landsantikvarur nøkur, ið verða endurgivin niðanfyri:*

Símun V. Arge



Tankin um at gera eitt útisavn í Hoyvík kom fram longu í 1967 í samband við, at ætlanir tá vóru frammi um at flyta Royndarstøðina úr Hoyvík. Eisini var hetta endamál havt í huga, tá garðarnir vóru útskiftir við tað, at allur bøurin í Hoyvík varð lagdur aftur at Royndarstøðini, meðan festarin fekk endurgjald fyri at flyta niðan á Vatnaskørð. Føroya Fornminnissavn var tá áhugað í at yvirtaka Royndarstøðina sum eina heild, og longu í 1973 varð ætlan og uppskot um friðing av Hoyvíksgarði send landsstýrinum við stovnan av Hoyvíksgarði sum útisavni sum endamál.

Í 1980 skrivar landsantikvarurin til landsstýrið um at gera av, at Hoyvíksgarður verður at nýta sum fornminnissavn. Hann vísir á gomlu bygningarnar sum útisavn og ger samstundis vart við, at fjósið og løðan hjá Royndarstøðini eru nýtilig sum arbeiðshøli hjá starvsfólkunum. Víst verður á økið sum fríøki so hvørt sum Hoyvíkshagin verður útbygdur til størsta býarpart í Havnini - hetta samb. býarplaninum, har Hoyvíkin eisini er løgd út sum fríøki. Eisini skrásetir Fornminnissavnið og ger yvirlit yvir bygningar og møguleikar fyri at nýta teir til savnsendamál. Seinni setir so Fornminnissavnið fram ynski um at byggja nýggja bygning til framsýningar og arbeiðshøli - víst verður í hesum sambandi á lendið har vakstrarhúsið stóð oman fyri Kúrdal.

Arbeiðsbólkur ger frágreiðing og tilmæli til landsstýrið viðv. framtíðarnýtslu av bønum hjá royndarstøðini, og í 1983 samtykkir landsstýrið at taka undir við hesum tilmæli um, at Royndarstøðin við húsum, bøi og haga verður løgd undir Føroya Fornminnissavn.

Sama ár verður heildarætlan løgd fyri landsstýrið, har gjørt verður vart við, at í Hoyvík renna fleiri áhugamál saman: nevniliga vernd av týdningarmiklum siðsøguligum og náttúruligum umhvørvi, útisavn, frílendi og fornminnissavn!

Víst verður á, at øll hesi áhugamál kunnu verða tengd saman í eina heild, ið verður umsitin av Føroya Fornminnissavni. Aftur her verður víst á økið við gamla Vakstrarhúsið sum egnaðan stað at byggja nýtt fornminnissavn.

1. januar 1984 yvirtekur Føroya Fornminnissavn so endiliga Royndarstøðina - ella alla Hoyvíkina innangarðs. Kostnaðarmeting verður gjørd, og peningur játtaður, og farið verður í gongd við at umvæla bygningarnar hjá Royndarstøðini til savnsendamál. Á vári 1988 flutti Fornminnissavnið endaliga inn uppi í Hoyvík.

### Útisavnið Heima á Garði

Kjarnin í útisavninum Heima á Garði er einahelst bóndahúsini - tey stásiligu sethúsini. Vit leggja tó til merkis, at her eisini eru aðrir bygningar, størri og smærri, har nøvnini, teir bera, bera boð um nýtslu teirra:

Her finst Svalhús, Tarvafjósið, Eplahúsið, Fiskahjallur, bert fyri at nevna nakrar. Nakrar av bygningunum var bert neyðugt at umvæla, meðan aðrar var neyðugt at endurreisa frá grundini so at siga.

Men ikki nóg mikið við tí - her finst varðveitt alt tað umhvørvið, ið hoyrdi til og sermerkti ein føroyskan garð: túnið ella heimrustin, har bygningarnir standa, uttan um húsini er bøurin, gyrdur av bøgarðinum, og niðan frá húsunum gongur geilin, har kríatúrini vórðu leidd niðan út um bøin, og har gøtan gongur niðan frá. Og so hava vit sjálva víkina og fjøruna. Sostatt finst her eitt umhvørvi, har tað hevur borið til at endurskapa ein føroyskan bóndagarð. Vert er at undirstrika, at talan ikki bert er um eini einstøk hús, ið verða varðveitt, men um eina heild, og er hetta sera umráðandi, um hin vitjandi skal skilja, hvussu ein garður sum hesin hevur virkað.

### Varðveiting, rannsóknir og restaurering

Restaureringin og umvælingin av bygningunum er grundað á stórt forarbeiði, ið er grundað á bæði søguligar og fornfrøðiligar heimildir, eins og á frásagnir frá fólki, her hava livað, og hava tær verið okkum til ómetaliga hjálp til at greina tað truplu byggisøgu, aleina sethúsini rúma og innrættingina við.

Arbeiðið hevur verið sera umfatandi, og talan hevur verið um eitt ógvuliga breitt samstarv millum allar deildir og flestu starvsfólk savnins. Kann nevna, at øll gólvini hava veið tikin upp, lendið undir gólvinum er skrásett fornfrøðiliga, hvørt brettið vent og snarað, vindeyguni vórðu tikin úr, reinsað, umvæld og sett í aftur. Sama er við klædninginum og tekjuni. Stutt sagt - høvuðssjónarmiðið hevur verið, at alt, ið kundi endurnýtast, skuldi nýtast aftur, so minst sum gjørligt av nýggjum er komið afturat - hetta fyri at húsini skulu vera so upprunalig sum til ber.

Arbeiðið varð sett í verk



*Við at kaga inn í úthúsini vil hin vitjandi hava høvi at síggja tað, ið hesir bygningar vórðu nýttir til og tað, ið har varð goymt av eitt nú føroyskum mati. Hetta fer kanska at hava serligan áhuga hjá útlendingum, heldur Símun V: Arge*